# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ljós yvir landið

Vit eru komin væl inn í dimbuldagavikuna, og tað gongur ímóti ljósari tíðum. Klokkan er flutt, dagarnir eru longdir, myrkrið hevur mist takið á kvøldunum, og nú er tað eisini ljóst, tá ið farið verður upp til dagsins gerning.

Stilla vika verður páskavikan eisini nevnd. Vit liva í landi, har tað er kristna siðalæran, sum er grundarlagið, og hóast tað ofta er frammi, hvussu sekulariserað okkara vælsignaða samfelag er, so sæst tað aftur á so mangan hátt, at vit nærkast einari av allar størstu høgtíðunum í kristna heiminum. Eitt nú í útvarpinum, har tað bæði í barnasendingum og morgunlestri verður gjørt burturúr Jesu líðingarsøgu.

Kynstrið er at fáa kirkjur og samkomur, siðalæruna, sekulariseraða samfelagið og fólkaræðið at hava gott áralag. Nú virðispolitikkurin kring heimin og eisini heima hjá okkum fær alt greiðari profil, kemur tað meiri enn so fyri – og soleiðis skal tað vera í fólkaræðisligum samfelag – at aldukambarnir eru høgir. Men um vit sammeta spælireglurnar og spælið, um tað ber til at siga tað soleiðis, heima hjá okkum við tað, sum gongur fyri seg so nógva aðra staðni, so kunnu vit ikki siga annað, enn at okkara samfelag er sonn perla.

Nú fyrireika vit okkum til halgidagarnar. Tað gera vit heima við hús, á arbeiðsplássum og alla staðni, har fólk koma saman og hittast. Tað er tekin um góða samfelagsheilsu, at alt yður í lívi. Kirkjur og samkomur gera seg út til páskahøgtíðina, og føroyingar ferðast hesa ársins tíðina meiri, enn tað nakrantíð áður hevur verið gjørt – bæði innanlands og uttanlands.

Fótbólturin rullar fleiri umfør á páskum, telvararnir sita boygdir yvir borðini í Klaksvík, kappróðrarbátarnir verða flotaðir, tað verður skipað fyri útferðum upp á tindar og fram í dalar, og tey eru mong, sum nýta høgtíðsdagarnar at bjóða til góðan døgurða ella frokost ella morgunmat.

Vinnulívið ger seg til at halda páskir, og mest sum ov nógv verður keypt og bunkrað. Fleiri línuskip eru uttanlands og selja. Hýsuprísurin sigst vera hægri í útlandinum í hesi vikuni, enn hann er heima á klettunum. Í útgangsstøðinum er tað best, at sum mest verður virðisøkt í Føroyum, men opinleikin og harvið møguleikin fyri kapping um tilfeingið er ikki at forakta.

Løgtingið heldur frí í dimbuldagavikuni. Politisku motorarnir verða ladaðir, áðrenn valstríðið av álvara fer at gera um seg.

Góða veðrið ber við sær, at langi og strangi veturin er gloymdur. Vit gleðast um fuglalívið og smálombini, og vit gleðast um, at ljósið skýnur yvir samfelag okkara. Bæði so og so.

**Sosialurin**

# Fyritreytin fyri gagnligum orðaskifti er sakligar grundgevingar

## – ein rættleiðing til Jákup Petersen, yvirlækna

**HANS PAULI STRØM**
landsstýrismaður



Jákup Petersen, yvirlækni á Landssjúkrahúsinum, hevði herfyri eina greinarøð í Sosialinum við ikki færri enn 3 dupultsíðum, sum var ein long skotriða av ósakligum álopum á føroyska sjúkrahúsverkið, serstakliga Landssjúkrahúsið, sum hann við følskum ákærum legði undir at søpla skattaborgarans pengar burtur, uttan at vit fingu nakað afturfyri.

Høvuðsboðskapurin hjá Jákupi Petersen, yvirlækna var, at sjúkrahúsverkið á hvørjum ári søplar hundraðtals milliónir burtur, og at hækkingarnar av játtini til Landssjúkrahúsið eru burturspiltir pengar – tað er sum at blaka pengar út gjøgnum vindeyga, segði yvirlæknin.

Oman á tað heila tømdi yvirlæknin so byrsuna í føroyska sjúklingahotellið í Keypmannahavn, men tað hevur leiðarin har, Anna Maria Durhuus, tikið sær væl og virðiliga av.

Sjálvsagt kundi eg ikki lata hetta grova álopið á føroyska sjúkrahúsverkið standa ósvarað, tí eg havi jú ovastu politisku ábyrgdina av tí. Tí vísti eg eisini á í eini grein, at ákærirnar hjá Jákup Petersen, yvirlækna, vóru falskar, tí tær bygdu á eitt skeivt og ósakligt grundarlag.

Nú gevur yvirlæknin ilt av sær, og fer heilt í offurrolluna. Yvirlæknin gremur seg um, at nú fer landsstýrismaðurin ”uttan um sjúkrahússtjóran og leypir beinleiðis á eitt starvsfólk undir honum við hóttandi tónalagi og alment boð um munnkurv”. Serliga eru tað orðini, sum Sosialurin setti oman fyri samrøðuna, sum blaðmaður hevði við meg um greinina, og har sama yvirskrift, verður sett sum gloypibiti á forsíðuna: ”Hans Pauli Strøm: framferðin hjá yvirlæknanum má steðgast”. Hetta er ikki tað, sum eg havi skrivað ella sagt, men ein redaktionel yvirtulking, sum tey á Sosialinum hava gjørt. Hesa eigi eg ongan lut í.

Í samrøðuni við blaðmannin legði eg tvørturímóti júst stóran dent á, at mítt aftursvar til Jákup Petersen hvørki var ein munnkurv ella nøkur hóttan. Tað kann blaðmaðurin eisini vátta, tí hann endurgevur meg rætt, tá hann siterar meg í somu samrøðu:

”Hann (Hans Pauli Strøm) viðurkennir, at øll hava rætt at gera vart við seg, tá ið viðurskifti ikki eru í lagi. Hetta er ikki ein roynd at múlabinda yvirlæknan, men vit mugu seta ávís krøv til tær atfinningar, sum verða settar fram. Og minsta kravið má vera, at tað er hald í atfinningunum, og at atfinningarnar eru sakligar, sum verða førdar fram. Men tað er tað ikki í hesum føri. Hans Pauli Strøm staðfestir, at hetta kann ikki halda fram. Hetta er ikki ein hóttan, tað kann einhvør tulka sum tey vilja, men hetta kunnu vit ikki finna okkum í.”

Í sínum aftursvari fer Jákup Petersen enn einaferð eftir hagtølunum, og roynir at bagatellisera sínar grovu feilir við m.a. at skriva: ”Í fyrstu talvuni er ikki so stórur munur á teimum tølum, sum landsstýrismaðurin og eg hava sett fram.” Hetta er púra burturvið at skriva, tí tað er júst tey skeivu tølini hjá Jákupi um miðal útreiðsluna í Føroyum og í Danmark, sum er sjálvt grundarlagið fyri hansara pástandi um at føroyska sjúkrahúsverkið søplar hundraðtals miljónir burtur.

Jákup Petersen ger eisini enn einaferð nógv burtur úr uppgerðini, um hvussu nógv sjúkrahús eru í ymiskum londum. Hann vísir til tøl frá danska heilsumálaráðharranum, sum aftur hevur síni tøl frá WHO. Men ein og hvør kann siga sær sjálvum – ein og hvør – at her ruggar ikki rætt, tá talvan hjá Jákupi vísir, at í t.d. í Finlandi eru 7,5 sjúkrahús pr. 1000 íbúgvar, í Íslandi 8,2 men í Svøríki bert 1,0. Sjálvandi eru hetta tøl sum eru burturvið at seta við síðuna av hvørjum øðrum, tí innihaldið er ikki tað sama frá einum landið til annað. Orsøkin er tann einfalda, so sum tað verður sagt í Nordic Statistical Yearbook, at skal man samanbera tølini, so skal man bara taka reglulig sjúkrahús við, og ikki tað stóra talið av sonevndum ”helsovårdcentraler” ella heilsumiðstøðum, sum ikki eru sjúkrahús. Júst í Finnlandi eru eini 260 av hesum slagnum og í Íslandi meir enn 20, og tá alt tað eisini verður tikið við í teirra tølum, verða tølini sjálvsagt nógvar ferðir hægri enn t.d. í Svøríki og Danmark, har bert er roknað við regluligum sjúkrahúsum. Talvan hjá Jákupi Petersen er tí meira villeiðandi enn nakað annað. Men tað ber kortini til at seta beinari tøl upp, sum byggja á upplýsingar, ið beinleiðis kunnu samanberast frá einum landi annað. Tað er tað sum er gjørt í talvuni frá Nordic Statistical Yearbook, sum eg vísti til í mínari grein. Eftir henni eru tað so 80 sjúkrahús í Svøríki, 53 í Danmark, 72 í Finnlandi, 3 í Íslandi og 3 í Føroyum.

At enda: eg haldi tað er bæði sunt og gagnligt, at starvsfólk í okkara heilsuverki, tað veri seg yvirlæknar ella onnur, geva sær stundir til, sum Jákup Petersen sigur: ”av og á at rætta sær ryggin og byrja eitt alment orðaskifti” um ymisk viðurskifti, av fakligum og heilsupolitiskum slag ella annað, sum liggur teimum á hjarta – sum hann sigur, kann ”lyfta verkið enn hægri upp”. Tað gera vit framhaldandi best í einum sakligum og konstruktivum anda.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Eyðhild Jacobsen eydhild@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.